UTTAN ÚR HEIMI

Stevna tubbaksídnaðinum

Mánadagin byrjaði eitt rættarmál, sum kann enda enda á amerikanska tubbaksídnaðinum.

Tað er amerikanski staturin, sum hevur stevnt teimum stóru altjóða tubbaksverksmiðjunum. Staturin vil vera við, at verksmiðjurnar hava nýtt villleiðandi upplýsingar tey seinastu 50 árini við at siga, at royking er ikki so vandamikil kortini. Kravið hjá statinum er, at tubbaksídnaðurin skal gjalda heilar 280 milliardir dollarar í endurgjaldi, og hetta er størsta endurgjaldskrav, sum nakrantíð er sett í USA.

John Aschroft, løgmálaráðharri, segði beint undan fyrsta rættarfundinum mánadagin, at málið hevur stóran týdning í royndunum hjá myndugleikunum at revsa fyritøkur, um villleiða síni viðskiftafólk. Amerikanskir eygleiðarar siga, at tubbaksverksmiðjurnar fara á húsagang, tapa tær rættarmálið.

Vaktarmenn rændu banka

Leiðslan hjá teimum fronsku friðarvarðveitandi hermonnunum í Fílabeinsstrondini hevur gjørt av at kanna, um tólv hermenn stjólu pengar úr einum banka, sum teir vóru settir at verja.

Teir tólv hermenninir komu fyri ein hernaðardómstól í París týsdagin, og har bleiv avgjørt at kanna málið nærri. Undir avhoyringini viðgingu hermenninir, at teir høvdu verið inni í bankanum, og keldur hjá franska herinum hava sagt, at hermenninir tóku knappar 600.000 krónur við sær. Sagt verður eisini, at hermenninir hava brúkt tað mesta av pengunum.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at franskir hermenn eru lagdir undir at hava tikið pengar úr einum banka í Fílabeinsstrondini. Í januar vórðu fýra hermenn skuldsettir fyri at hava tikið pengar úr einum banka, sum teir skuldu verja.

Gongutúrar gera gott

At tað er gott fyri hjartað og líkamið sum heild at ganga nógv, munnu tey flestu vita, men nú siga amerikanskir granskarar, at hjá fólki, sum eru farin um tey sjeyti, kunnu gongutúrar hjálpa til at halda heilan kláran, eins og túrarnir kunnu forða fyri, at fólk fáa Alzheimers.

Granskararnir hava kannað 2257 menn í aldrinum frá 71 til 93 ár, og kanningarnar vístu, at menn, sum ikki ganga meiri enn einar 400 metrar um dagin, eru í nógv størri vanda fyri at fáa Alzheimers enn teir, sum ganga tríggjar kilometrar um dagin. Granskararnir hava eisini kannað meiri enn 16.400 kvinnur ímillum 70 og 81 ár, og har vísti tað seg, at tær, sum vóru úti og spákaðu hálvan annan tíma um vikuna, vóru nógv betri fyri enn tær, sum gingu minni.

Ein av granskarunum, Jennifer Weuve, sigur við tíðindastovuna AP, at úrslitið kom rættiliga óvart á granskararnar, tí teir høvdu ikki væntað, at gongutúrar hava so nógvar sálarligar fyrimunir við sær.

Vilja síggja Hitler-film

Ikki færri enn 480.000 týskarar vóru seinasta vikuskiftið og hugdu at filminum "Der Untergang", sum snýr seg um teir seinastu tólv dagarnar hjá Adolf Hitler.

Tey, sum hava sæð filmin, siga, at tey hava roynt at lýsa bæði ta bleytu og ta hørðu síðuna av Hitler, sum tikið verður til. Tey, sum ummæla filmar, eru ósamd. Summi siga filmin vera ov positivan, meðan onnur siga hann vera ov ræðandi. Fyrrverandi kanslarin Helmuth Kohl, sum hevur hugt at filminum, sigur, at hann gevur tí unga týska ættarliðinum eina góða mynd av ræðustýrinum hjá nazistunum.

Sambært BBC vórðu tveir ungir nýnazistar tiknir í einari filmshøll um vikuskiftið, tí teir heilsaðu við at hevja annan armin, sum nazistarnir gjørdu. Tað er bannað í Týsklandi.

Óður maður ætlar at myrða Bush

Amerikanska løgreglan leitar eftir einum manni, sum hevur boðað frá, at hann ætlar sær at myrða George W. Bush, forseta

USA
Árni Joensen:
fartekst@mail.dk

Seinastu dagarnar hevur amerikanska løgreglan leitað eftir tí 59 ára gamla Lawrence Ward. Hann fór frá húsum seinasta mikudag, og síðani hevur eingin borið eygað við hann.

Ein granni boðaði løgregluni frá, at Lawrence Ward helt lítið um George W. Bush, forseta, og tá løgreglan kannaði íbúð hansara, komu teir fram á eina mynd av forsetanum. Tvørtur um myndina hevði stóð skrivað "Dead Man" (deyður maður).

Løgreglan og trygdartænastan Secret Servoice stúra fyri, at maðurin fer at royna at beina fyri forsetanum. Kona Lawrence Ward hevur greit løgregluni frá, at maðurin er óður í høvdinum, og at ein av hansara stóru fyrimyndum er Timothy McVeigh. Tað var hann, sum í 1995 legði bumbuna í Oklahoma City, ið kravdi 163 mannalív.

Avgerðin er fallin

Norska Nobel-nevndin hevur gjørt av, hvør fær friðarheiðurslønina í ár. Gitingarnar eru nógvar

HEIÐURSLØN
Árni Joensen:
fartekst@mail.dk

Tann 8. oktober fer norska Nobel-nevndin at boða frá, hvør fær friðarheiðurslønina í ár. Skrivarin í nevndini, Geir Lundestad, segði í gjár, at nevndin hevur tikið avgerð, men at tað verður ikki almannakunngjørt fyrr enn tann ásetta dagin.

Nobel-nevndin hevur fingið 194 uppskot í ár, og tað er tað mesta nakrantíð. Í norskum fjølmiðlum verður gitt, at leiðarin í kjarnorkueftirlitinum hjá ST, Mohammad El Baradei, hevur ein góðan møguleika at fáa heiðurin. Onnur evni eru fyrrverandi leiðarin hjá ST-vápnaeftirlitsmonnunum, Hans Blix, og amerikonsku politikararnir Sam Nunn og Richard Luger. Teir báðir eru serliga kendir fyri arbeiðið ímóti kjarnorkudálking.

bin Laden hevði valt Bush

Var Osama bin Laden amerikanskur ríkisborgari, hevði hann valt George W. Bush á forsetavalinum í november

YVIRGANGUR
Árni Joensen:
fartekst@mail.dk

Sambært bretskum diplomatum vónar Osama bin Laden, at George W. Bush verður afturvaldur

Loynilig skjøl frá einum fundi ímillum bretskar og italskar diplomatar eru komin uttanríkisráðnum í London illa við, tí tey avdúka, at nógv teir flestu bretsku diplomatarnir vilja hava George W. Bush, forseta hægru, piparið grør.

Eitt nú segði bretski sendiharrin í Italia, Sir Ivor Roberts, á fundinum, at Bush er tann besti umboðsmaðurin hjá Osama bin Laden, tí hann útvegar al-Qaeda fleiri og fleiri limir.

Á fundinum tosaðu diplomatarnir um, hvørt evropeararnir høvdu valt Bush ella John Kerry, og breið semja var um, at teir høvdu valt Kerry. Her legði Ivor Roberts afturat:

– Er nakar fegin um, at Bush verður afturvaldur, er tað al-Qaeda. Hevði bin Laden havt valrætt í USA, hevði hann valt Bush.

Bretska blaðið The Guardian skrivaði fyrradagin, at á einum fundi ímillum bretskar og arabiskar diplomatar herfyri var støðan hjá diplomatunum tann sama. Allir søgdu seg vóna, at Kerry fer at vinna á Bush.

Sambært blaðnum koma avdúkingarnar bretsku stjórnini illa við, tí alment er Bretland tann hollasti stuðulin hjá Bush-stjórnini.

Vígdi lív sítt til tey fátækastu í Afrika

Alt arbeiðslív sítt hevur trúboðarin Gudrun Vest arbeitt millum tey allar fátækastu langt úti í bushinum í Tanzania í Afrika. Nú vitjar hon aftur í Føroyum

TRÚBOÐARI
Tíðindaskriv



Gudrun Vest hevur givið mongum fátækum kvinnum mót og styrki at koma víðari í lívi sínum.

Øll tey nógvu árini í Tanzania hevur Gudrun serliga arbeitt millum tær fátækastu kvinnurnar. Hon hevur savnað kvinnurnar saman, ráðgivið teimum um húsarhald og um barnaavmarking. Hon hevur lært tær um heilsusaman mat, hondarbeiði og í heila tikið tosað við tær um felags trupulleikar. Tá ið kvinnurnar standa saman og stuðla hvør aðrari, verða tær sterkari og fáa eisini mót og styrki bæði til at loysa egnar trupulleikar og felags trupulleikar.

Stóran menniskjakunnleika

Gudrun er ein stór persónmenska og dugir serliga væl at liva seg inn í liviumstøðurnar hjá fólki, eisini tí hon hevur so stóra virðing fyri tí einstaka menniskjanum. Sum hon sjálv sigur tað: "Øll menniskju eru so áhugaverd".

Tað kennist altíð væl at tosa við hana, tí hon er altíð tilstaðar í samrøðuni, harafturat er hon klók og fer beint til kjarnan í einum máli. Júst tað, at hon er so rólig og umhugsin, hevur við sær, at øll kenna seg væl saman við henni.

Nógv eru tey, sum hava nýtt gestablídni hennara í Tanzania og upplivað tann friðin, sum valdaði í lítla húsi hennara har.

Eldsálin ríkar okkum øll

Eftir 36 ár í Tanzania er Gudrun nú komin heimaftur til meira heimliga jørð í Jútlandi, har hon er fødd og vaksin upp. Tíðina nú brúkar hon til at ferðast runt og fortelja bæði um arbeiði sítt og um livikorini í Tanzania.

Í døgunum 25. til 29. september vitjar hon í Føroyum. Leygarkvøldið verður hon við á ungdómsmøtinum í Meinigheitshúsinum á Skála. Sunnudagin fer hon at prædika í Christianskirkjuni í Klaksvík og um kvøldið verður hon í Missiónshúsinum Thabor á Toftum. Mikukvøldið 29. september verður hon at hoyra á almennum ytrimissiónsfundi í KFUK í Havn.

Hvussu gagnnýta vit best ta menniskjaligu orkuna

Seminar um "Human Resource Management" verður á Hotel Føroyum 21. og 22. oktober, sum ráðgevingarfyritøkan Hugin skipar fyri

TÍÐINDASKRIV

Tann avgerandi tátturin í kappingarførleikanum hjá eini fyritøku er tað tilfeingið, sum starvsfólkini bera uppi: Tann menniskjaliga orkan.

Framtíðin krevur amboð til at menna og gagnnýta ta menniskjaligu orkuna til fulnar, so at øll í fyritøkuni arbeiða til frama fyri felags málum. Tí er HRM — human resource management — vorðið eitt umráðandi amboð hjá leiðslum á fyritøkum og stovnum, almennum sum privatum. Í døgunum 21. og 22. oktober skipar ráðgevingarfyritøkan Hugin fyri einum seminari um hetta hugtak á Hotel Føroyum.

Hugin er ein ráðgevingarfyritøka, sum fæst við heildarmenning av fyritøkum við útgangsstøði í tørvinum og orkuni hjá einstøku fyritøkuni. Grundsjónarmiðið er, at lykilin til framburð liggur í vitanini hjá teimum, ið longu eru í fyritøkuni.

Hugin (spf.) varð stovnað og fór til verka í mai 2003, og fyritøkan hevur síðan ráðgivið bæði almennum stovnum og privatum fyritøkum.

Seminarið um HMR vendir sær serliga til stjórar, leiðarar og starvsfólk, ið dagliga fáast við starvsfólkaleiðslu og -menning. Endamálið er at geva luttakarunum innlit í nøkur av týdningarmestu evnunum innan fyri HRM í dag. Serligur dentur verður lagdur á at viðgera sambandið millum handilsstrategi hjá eini fyritøku og HRM. Hugt verður eisini eftir, hvussu til ber at skipa sína HRM-funktión.

Dagarnir eru skipaðir við kjakuppleggum, kjaki, fyrilestrum, arbeiði við dømum og umbýti av vitan millum luttakararnar. Til ber eisini at tosa um og viðgera tína egnu fyritøku, hvar hon er stødd í hesum høpi, og hvussu farið verður víðari.

Við at luttaka á skeiðnum fært tú svarað einari røð av spurningum: Hvussu verður HRM-politikkurin samskipaður við handilsstrategi. Hvussu rationaliserar fyritøkan á ein skilagóðan hátt. Hvussu tryggjar eitt virki sær tey røttu fólkini. Hvørji amboð eru til tess, og hvørjir eru fyrimunirnir og vansarnir. Hvussu skapar fyritøkan eina góða menningar- og útbúgvingarætlan fyri starvsfólk. Hvør skal gjalda. Og mangt annað.

Stutt sagt er seminarið ætlað at vera íblástur og kanska ein lopfjøl hjá eini fyritøku at viðgera sína støðu til Human Resource Management. Bæði hjá teimum fyritøkum, ið longu hava eina líknandi funktión, og teimum, ið vilja hava eina.



Steinbjørn Hardlei, stjóri í Hugin, er annar av undirvísarunum á skeiðnum. Hann hevur millum annað altjóða serútbúgving í broytingarleiðslu

Undirvísarar verða Henrik B. Sørensen og Steinbjørn Hardlei:

- Henrik B. Sørensen er cand. merc og Ph.D í organisation á deildini fyri virkisleiðslu á Århus Universiteti. Hann er ráðgevi fyri fleiri danskar fyritøkur og er vanur at halda fyrilestrar um evnið.
- Steinbjørn Hardlei er Ba. Oceon í virkisbúskapi frá Århus Universiteti og hevur altjóða serútbúgving í broytingarleiðslu á Professional Development Institute í Belgia. Hann er stovnari og stjóri í fyritøkuni Hugin.

Meira fæst at vita um tilmelding o.a. á heimasíðuni hugin.fo.

FØROYA LANDFÚTI
POLITIMEISTARIN

KUNNING FRÁ FÚTASKRIVSTOVUNI UM PASS

Tann 1. oktober 2004 verður nýggja útgávan av føroyska/danska passinum tikin í nýtslu.

Nýggja passið er eitt hátøkniligt trygdarpass.

Onki krav verður sett um umbýtan av galdandi passi!

Av tí at nýggja passframleiðsluútgerðin er so kostnaðarmikil, er avgerð tikin um at gevast við passframleiðsluni í Føroyum, soleiðis at øll passframleiðsla verður miðsavnað í Danmark.

Hetta ger, at møguleikin hjá fútaskrivstovuni í skundi at útskriva nýtt pass eftir 1. oktober 2004 dettur burtur. Í staðin ber til í summum førum at framleingja verandi pass ella at fáa útflýggja "provisorisk" (fyribils) pass.

Hetta førir eisini við sær, at passavgreiðslutíðin tá verður umleið 2 - 3 vikur. Tí er alneyðugt, at fólk, ið hava tørv á nýggjum passi eftir 1. oktober 2004, umbiðja passið í góðari tíð.

Frá 1. oktober 2004 kunnu børn undir 15 ár ikki verða skrivað í pass hjá foreldrum ella øðrum og skulu tá hava egið pass.

Mannagongdin at umbiðja pass verður hin sama sum nú. Passavgreiðslur eru á fútaskrivstovuni í Havn og á politistøðunum uttanfyri Havnina.

Upplýsingar um pass annars eru tøkar á heimasíðuni hjá politinum: www.politi.fo

M. Nepper-Christensen

Smyrilsvegur 20 Postboks 3018 FO-110 Tórshavn Tel (+298)351448 Telefax (+298) 351452